# Sílið sera sannførandi

*Tá tað restaðu tvey hundrað metrar, var Sílið leyst av hinum bátunum, og á málinum vóru tað næstan tvær bátslongdir á muni*
*Mynd: Álvur Haraldsen*




**Argjagentur vóru stinnastar í kappingini um næstfremsta plássið, men Fípan Fagra vann bronsumerkini**

5–MANNAFØR GENTUR

*Jóannes Hansen*

Tað hevur verið sjón fyri søgn alt summar. Sílið hevur verið mannað við so nógv tí bestu gentumanningini. Á ólavsøku í heimasjógvi vístu tær umborð á Sílinum, at tað var eingin slingur á valsinum.

Blikur av Argjum fekk besta startin, og Fípan Fagra og Sílið fylgdu væl við. Harvið var tónin sligin ann. Ikki til kappingina um fremsta plássið, men um hvør skuldi kappast um næstfremsta plássið.

Tá startspurturin var gott og væl av, hevði Sílið bæði lagt seg upp á síðuna av og tikið Blik.

Á Molanum var munurin til Fípuna Føgru og Blik ein hálv bátslongd, og so var skjótt, at munurin varð longdur til eina bátslongd og meiri enn so. Tá tað restaðu tvey hundrað metrar, var Sílið leyst av hinum bátunum, og á málinum vóru tað næstan tvær bátslongdir á muni.

Kappingin millum Blik og Fípuna Føgru minti nógv um kappingina millum hesar báðar bátarnir á ólavsøku í fjør. Tá hevði Fípan Fagra longu frammanundan tryggjað sær FM heitið við at vinna fimm teir fyrstu róðrarnar. Men á ólavsøku vórðu klaksvíksgenturnar snýttar at Bliki, sum vann síðsta róðurin.

Hesa ferð kappaðust somu manningarnar um næstfremsta plássið í ólavsøkuróðrinum, og aftur hesa ferð vóru tær av Argjum tær stinnaru. Munurin var meiri enn ein bátslongd. Longu undan ólavsøkuni hevði Fípan Fagra tryggjað sær silvurmerkini í FM kappingini.

Aftur hesa ferð var luttøkutalið størst í genturóðrinum. Ørnin, Drekin, Tjaldrið, Havfrúgvin og Tekla vóru við í kappingini um FM stigini. Síðstur á mál var Broddur. Tá hann kom á mál, høvdu tær á Sílinum frøtt seg um ólavsøkusigurin og FM heitið í 37 sekund og tað var skjótt, at munurin var so mikið øktur, at eingin ivi var um, hvar sigurin skuldi enda.

## Hesir bera orð og myndir kring landið

Kappróðrarárið 2002 er liðugt. FM vinnararnir eru funnin, steyp og heiðursmerki eru handað og býtt kring landið, og bátarnir eru drignir í neystini, har teir fara at standa til eina ferð í vár.

Áhugin fyri kappróðrinum er stórur, og tað fjølmiðlarnir gera støðugt meiri fyri at siga frá og lýsa umstøðurnar á róðrarplássunum, í feløgunum og millum rógvararnar.

Útvarp Føroya hevur verið fastur fúsur, síðani tað fór at senda í 1957. Eins og í nógv flestu FM kappingunum síðsta stóra mansaldurin, so var tað á ólavsøku Jógvan Arge, sum segði frá.

Sjónvarpið ger eitt sindur við at senda frá kapp-róðri. Teir fáa upptøkur frá øllum róðrunum, og tey eru fleiri, sum halda, at tað hevði verið fínt tilfar, um SvF sendi róðrarnar í fullari longd. Eisini hóast talan ikki hevði verið um beinleiðis sending.

Róðrarsambandið skipar fyri upptøku av róðrunum. Tað er Rúni Person, sum er nevndarlimur í Havnar Róðrarfelag, sum er upptøkumaður. Higartil hevur bara úrslitið av tí, sum Rúni hevur tikið upp, verið at sæð. Men her síggja vit hann røkja uppgávuna, sum hann nýtir ein stóran part av frítíðini í vikuskiftinum til, meðan kappróðrarárið er í hæddini.






# Jarnbardur í stórum stíli

**Enn eina ferð stóðu Knørra kvinnurnar fyri mest sannførandi sigrinum av øllum**

6–MANNAFØR KVINNUR

*Jóannes Hansen*

Kanska onkur miðvingur í tí dulda vónaði, at góða avrikið hjá Riddaranum í heimasjógvi á ólavsøku skuldi verða endurtikið, og at hóttanin, sum Riddarin á seinastu metrunum í Miðvági var ímóti Jarnbardi, skuldi gerast til meiri enn eina hóttan.

Um tað var onkur, sum hevði sovornar dreymar, so vórðu teir skjótt gjørdir til einkis á ólavsøku.

Jarnbardur leyp avstað. Á fyrstu hálvt hundrað metrunum vunnu tær umborð á Jarnbardi eina hálva bátslongd í mun til kappingarneytarnar, og so var ongantíð nakar ivi um, hvør fór at vinna.

Spurningurin var heldur, hvussu sannførandi sigurin hjá Jarnbardi fór at vera. Á málinum var munurin meiri enn tvær bátslongdir, og um onkur av hinum bátunum skuldi havt dittað sær at sett meiri á, so er neyvan nakar ivi um, at tær umborð á Jarnbardi høvdu krút eftir. Tær vórðu í hvussu so er ikki trýstar at leggja alla orku í.

Kappingina um næstfremsta plássið vann Riddarin enn eina ferð. Gongurólvur hevði hug at vera við eina løtu, meðan Páll Fangi ikki fekk tann startin, sum tær fleiri ferðir fyrr í summar hava havt.

Men Páll Fangi tók Gongurólv, og Riddarin hevði ikki trupulleikar av at verja næstfremsta plássið, sjálvt um munurin frá Riddaranum og aftur til Páll Fanga á ongan hátt var so stórur, sum hann var frá Riddaranum og fram til Jarnbard, sum vann FM fyri sjeyndu ferð. Tað er fleiri ferðir, enn nakar annar hevur vunnið.




*Manningin á Jarnbardi vann mest sannførandi sigurin á ólavsøku*

*Mynd: Álvur Haraldsen*

# Argjabáturin endaði sum hann legði fyri

**Við einum framúr góðum endaspurti eydnaðist tað Argjabátinum at vinna fyri fyrstu ferð síðani á norðoyastevnu, men teir høvdu ongan møguleika at hótta meistaraheitið hjá Kvívíkinginum**

8–MANNAFØR

*Jóannes Hansen*

Teir hava stríðst, men tað hevur í fýra kappingum á rað ikki gingið, sum teir høvdu ætlað. Tað er manningin á Argjabátinum, sum tað snýr seg um. FM vinnararnir í 2000 løgdu ógvusliga fyri, tá teir vunnu í Klaksvík. Síðani gekk væl, men ikki so væl, sum teir kundu hugsa sær. Startspurtirnir vóru góðir, og endaspurtirnir vóru meiri enn brúkiligir, men hvørja ferð var Kvívíkingurin drúgvastur, tá alt kom til alt.

Tí er Kvívíkingurin FM vinnari. Teir hava verið drúgvastir, og vit ynskja Kvívíkinginum enn eina ferð hjartaliga tillukku við fyrsta FM heitinum, sum teir hava vunnið síðani 1996. Tað hava teir ruddu-liga uppiborið.




*Við sigrinum á ólavsøku endaði kappróðrarárið væl hjá Argjabátinum*

Men á ólavsøku var tað Argjabáturin, sum stjól myndina. Tað tóktist annars skula myndast, sum tað frammanundan varð roknað við. Mótsatt fleiri av hinum kappingunum í summar, so legði Kvívíkingurin seg á odda beinanvegin, og har lá hann nógv størsta partin av róðrarteininum.

Munurin til kappingarneytarnar var ikki so ógvuliga stórur, men við avrikunum í undanfarnu kappingunum í huga var ikki annað væntandi, enn at kvívíkingar fóru at vera teir drúgvastu.

Men tá tað restaðu hálvt annað hundrað metrar, fór Argjabáturin at gera um seg. Teir løgdu fyrst fyri í rættuliga endaspurtinum, teir tóku seg fram á Kvívíkingin, og kvívíkingar megnaðu ikki at svara aftur á sama hátt, sum teir á undanfarnu stevnunum høvdu gjørt.

Argjabáturin át seg samt og javnt fram á Kvívíkingin, og á síðstu metrunum fór hann framum. Munurin var lítil, men tað var eingin ivi um, at Argjabáturin hevði vunnið, og tað bjargaði róðrarárinum á Argjum, har tey eftir norðoyastevnuróðurin høvdu roknað við meiri, enn úrtøkan varð á Skálafjørðinum, í Hósvík, Vági og Miðvági.

Argjabáturin vann FM í 1991, 1992, 1994, 1995, 1997, 1998 og 2000. Tá tú vinnur so nógv er einki uttan tað besta nóg mikið. Kvívíkingurin streyk longu á vestanstevnu avstað við FM heitinum. Tað var eitt vónbrot hjá Argjabátinum, men á ólavsøku fingu argjamenn plástur á sárið.